# Føroyingur fekk st


Charles J. Olsen við einum Undulate Rey fiski, ið hann fiskaði í EM í havfisking í Suðuronglandi

## Føroyingur fekk størsta fiskin í EM í havfisking, og ein annar stórur fongur var, at Føroyar vórðu viðurkendar sum tjóð til hesar kappingar


Norðmaður við eini skøtu, ið vigaði 17 pund

### Fiskikapping

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Tríggir kappingarhugaðir føroyingar hava verið við til europameistaraskapið í havfisking, sum varð hildið har suðuri í Onglandi.

Charles J. Olsen, Heini Weihe og Magni Blástein settu kós í ein sunnan og bjóðaðu seg fram millum teir mongu dugnaligu fiskimenninar.

- Fiskiháttirnar máttu vit læra okkum av nýggjum. Tað var ikki sum í Føroyum, har tú lorar engda teinin niður á botn og so eitt sindur upp frá. Her fekst tú frystan makrel, høgguslokk og

Sosialurin